# Popp List 3 seldi mest

**Popp List 3 gjørdist tann fløgan, sum 3-arin í SMS seldi flestar av í 2004. Á listanum fyri árligu søluna gera Teitur Lassen og Eivør Pálsdóttir seg eisini galdandi**

FLØGUR
*Heini í Skorini*
*Heini_skorini@yahoo.com*

Í seinasta blaðnum undan jólum skrivaði Sosialurin, hvørjar bøkur hava verið mest seldar um jóltíðir. Men fløgurnar hava eisini verið nógvar undir jólatrøunum, og 3-arin í SMS hevur listar, sum avdúka, hvørjar fløgur hava verið mest seldar seinastu vikuna og seinasta árið.

### Eivør og Teitur

Av teimum 10 fløgunum á listanum fyri mest seldar fløgur hjá 3-aranum í SMS seinastu vikuna eru seks føroyskar, og tær eru Eivør Pálsdóttir (nr. 1), Popp List 3 (nr. 3), Maria Andersen (nr. 5), Mær halda harrans hendur (nr. 6), Salt (nr. 8) og Trøllapætur (nr. 10).

Av árligu samlaðu søluni er Popp List 3 á odda og hevur harvið heiðurin sum mest selda fløga í ár í 3-aranum. Teitur Lassen er á fimta plássi, meðan Eivør Pálsdóttir er á bæði sætta og níggjunda plássi



*Av 10 teimum mest seldu fløgunum í 2004 eigur Eivør Pálsdóttir tvær. Nýggja fløgan »Eivør« er á sætta plássi, meðan »Krákan« er nr. 9*

**Soleiðis sær topp-10 listin út fyri árligu søluna frá 1. Januar 2004:**

1. Popp List 3
2. Ymiskt - Now 8
3. Ymiskt - Now 7
4. Ymiskt - Now 10
5. Teitur Lassen - Poetry & Aerpl.
6. Eivør Pálsdóttir - Eivør
7. Ymiskt - Now 9
8. Guns'n'Roses - Greatest Hits
9. Eivør Pálsdóttir - Krákan
10. Ymiskt - Rock Ballads

**Soleiðis sær topp-10 listin út fyri tær fløgurnar, sum eru keyptar mest seinastu vikuna:**

1. Eivør Pálsdóttir - Eivør
2. Ymiskt - Now 10
3. Popp List 3
4. Britney Spears - Greatest Hits
5. Maria - Bert ein dag
6. Mær halda Harrans hendur
7. Ymiskt - Now Big Hits 2004
8. Salt - Salt
9. Linkin Park & Jay Z - Collision Course
10. Trølla Pætur - Í føðingardag hjá Trølla Pætur



*Fløgan hjá Teiti Lassen, »Poetry and Aeroplanes«, er nr. 5 á árliga listanum fyri mest seldar fløgur í ár í 3-aranum*

### Bilur útav í Hósvík

Hósnáttina fór ein bilur útav í Hósvík. Vakthavandi sigur, at talan var um eitt hálkuóhapp, og førarin var ikki ávirkaður. Óhappið hendi við bátahylin í Hósvík, har bilurin fór niðan av vegnum. Eingin fólkaskaði hendi, og bert minni skrokkskaði á bilin.

### Fór inn í holu leyvunar

Tíðliga tollaksmessumorgun fór ein bilur útav í Kollfjarðabotni. Tíbetur hendi eingin skaði við føraranum, sum tí slapp sær niðan á vegin aftur. Ein løgreglumaður, sum var ávegis til Havnar til arbeiðis kom framvið, steðgaði og prátaði við føraran, sum segði seg vera glidnan útav vegnum, orsaka av hálkuni.

Blíði løgreglumaðurin tók óhappsrakta mannin uppí bil sín, eftirsum teir jú skuldu sama veg allíkæl. Men sum teir koyrdu, varnaðist løgreglumaðurin, at alt ruggaði ikki rætt. Maðurin luktaði nakað nógv av alkoholi, og hann fylgdi tí við beinleiðis inn á støðina, har tað eisini varð staðfest, at maðurin var ávirkaður av rúsdrekka.

Hann verður tí ákærdur fyri at hava koyrt rúsdrekkakoyring, og at hava volt skaða.

Hví maðurin valdi at fara inn í holu leyvunar, og koyra til Havnar við einum løgreglumanni, eftir at hava gjørt eitt rúsdrekka óhapp, sigur søgan tó einki um.

### 6 smærri ferðsluóhapp 23.

Tollaksmessudag merktist, at fólk høvdu nógv um at vera í hálkuni. Heili 6 smávegis ferðsluóhapp hendu í Havn í miðstaðarøkinum orsakað av hálkuni. Eingin fólkaskaði hendi í nøkrum av óhappunum. Vakthavandi upplýsir, at talan í øllum førunum bert var um smávegis skrokkskaða, har bilar júst bóru við hvønn annan.

### 2 samanstoytir við autoverjuna

Vakthavandi sigur, at hóast tað eisini vóru nøkur fá ferðsluóhapp um dagin jólaaftan, so sást týðiligur munur á degnum frammanundan. Fólk høvdu ikki eins stóran skund, og tóku tað meiri róligt í ferðsluni.

Men úti á Argjum og í Kaldbaksbotni vóru tveir bilar, ið gliðu, og sum tískil rendu á autoverjuna. Báðir bilarnir fingu smávegis skrokkskaðar, men í hvørgum førinum hendi nakar fólkaskaði.

### Bilur fastur á Velbastaðhálsi

Hóast líkindini at koyra vóru ringast norðanfyri, so fekk løgreglan eisini eina fráboðan um ein bil, ið stóð fastur á Velbaðstahálsi. Førarin ringdi sjálvur til politiið, sum so sendi sløkkiliðið at hjálpa.

### Bilur útav í Hósvík

Hóast koyrilíkindini batnaðu, sum jólamorgun leið, so var framvegis ógvuliga hált.

Klokkan 14 fór ein bilur útav vegnum í Hósvík orsakað av hálkuni. Eingin fólkaskaði hendi, og bilurin fekk bert smávegis skrokkskaða.

### Hálkuóhapp í Havn

Jóladag var eisini eitt minni ferðsluóhapp í Havnini, tá tveir bilar rendu saman á Hoyvíksvegnum. Vakthavandi staðfestir, at orsøkin til óhappið var hálka, og at hvørgin bilførari var ávirkaður av rúsdrekka.

Bilarnir gliðu á hvønnannan, og fingu bert smávegis skaða.

### Smávegis ferðsluóhapp 2. dag

Vakthavandi sigur, at eisini 2. jóladag hendu nøkur smávegis ferðsluóhapp orsakað av hálkuni.

Ì Nesvík fór ein bilur útav vegnum klokkan 14, men har hendi lítil og eingin skaði.

Á Kaldsbaksvegnum vóru eisini tveir bilar, ið bóru við hvønn annan, men eisini her fekk hálkan alla skyldina. Eingin fólkaskaði var.

### 2 mans koyrt rúsdrekkakoyring

2. jóladag gjørdi løgreglan nakrar kanningar, har teir steðgaðu bilum og prátaðu við førararnar.

Fleiri bilar vóru tilvildaarliga steðgaðir, og tað vísti seg, at tveir av førarunum vóru ávirkaðir av rúsdrekka.

Annar varð tikin á Kaldbaksvegnum kl. 04., og hin í Havnini kl. 05. Báðir verða ákærdir fyri rúsdrekkakoyring.

### 3 x rok í Badmintonhøllini

2. jólakvøld var dansur í Badmintonhøllini, og tað gekk ikki heilt friðarliga fyri seg. Ikki færri enn tríggjar ferðir varð løgreglan fráboðað, tí ungfólk tókust, og fráboðararnir óttaðust stórar bardagar.

Vakthavandi upplýsir tó, at tað í øllum trimum førunum lagaði seg, tá løgreglan kom á staðið, og at tað tí ikki varð gjørt stórvegis meiri við málini.

**eys**